**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI KAMPUSØKIÐ**
SB_Tórshavn_Kampus_2025_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 1011b, 1016, 1017d, 1031g, 1035c og 1035h, Tórshavn og part av 932a, 1020a og 1025b, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ognum.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa kampusøkið á Frælsinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti D3 í 3. grundumráði, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Stk. 3. Sambært ásetingum fyri umráðispart D3, verður útstykking og bygging einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

Stk. 5. Partur av økinum er skógfriðað øki. Bygging má einans fara fram eftir loyvi er fingið sambært løgtingslóg um náttúrufriðing frá 9. juli 1970 § 2, stk. 2.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til bygningar til umsiting, skúlaskap, heilsurøkt, lestrabústaðir og tílíkt. Harumfarmt verður fríøki, felagsøki og felags parkering í økinum.

Stk. 2. Byggøki kann einans innan øki A, B, C, D og E. Byggjast skal ikki út um byggilinju víst á fylgiskjali 2.

Stk. 3. Øki, sum liggja uttanfyri byggilinju, skulu liggja órørd, tó so at gøtur kunnu gerast í økinum, sí fylgiskjal 2.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25 fyri økið sum heild.

Stk. 2. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,50 fyri økið sum heild.

Stk. 3. Í øki A skulu hús við vanligari mønuresing  ikki vera hægri enn 9 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann hægra síðan ikki vera hægri enn 9 m til hægsta punkt við útvegg.

UPPSKOT

Stk. 4. Í øki B skulu hús við vanligari mønuresing ikki vera hægri enn 11 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann hægra síðan ikki vera hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg.

Stk. 5. Í øki C skulu hús við vanligari mønuresing ikki vera hægri enn 12 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann hægra síðan ikki vera hægri enn 12 m til hægsta punkt við útvegg.

Stk. 6. Í øki D skulu hús við vanligari mønuresing ikki vera hægri enn 16 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann hægra síðan ikki vera hægri enn 16 m til hægsta punkt við útvegg.

Stk. 7. Í øki E skulu hús við vanligari mønuresing ikki vera hægri enn 20 m til mønuna. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann hægra síðan ikki vera hægri enn 20 m til hægsta punkt við útvegg.

**§5. VEGIR OG PARKERING**

Stk. 1. Farðleiðir merktar á fylgiskjali 2 skulu varðveitast, tó so at til ber at umleggja og broyta skap teirra.

Stk. 2. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 3. Parkeringspláss verða skipaði sum partur av eini heildarloysn fyri økið.

**§6. ÚTSJÓND**

Stk. 1. Øll bygging í økinum skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging, og skal hendan gerast við atliti at verandi bygging.

**§7. BYGGING IÐ ER**

Stk. 1. Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Bygningar, ið eru skrásettir við varðveitingarvirði 1-2 í Tórshavnar býaratlassi, skulu ikki broytast ella takast niður. Bygningar, ið eru skrásettir við varðveitingarvirði 3-6 skulu ikki broytast ella takast niður uttan serloyvi frá byggivaldinum. Sí varðveitingarverdir bygningar í økinum á fylgiskjali 3.

**§8. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

**§9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI**

UPPSKOT

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

UPPSKOT



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kampus | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:3000 | | | | |
| **Dagur** | 12.11.2025 | **Journal** | 25/05861 | **Teknað** | RVH |




- Øki A - 9 m
- Øki B - 11 m
- Øki C - 12 m
- Øki D - 16 m
- Øki E - 20 m
- Byggilinja
- Farleið

**Tórshavnar Kommuna**

**Býarskipanardeildin**

| | |
|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kampus |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 |
| **Mát** | 1:2000 |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | 12.11.2025 | **Journal** | 25/05861 | **Teknað** | RVH |




2 Høgt varðveitingarvirði
3 Høgt varðveitingarvirði
4 Miðal høgt varðveitingarvirði
5 Miðal høgt varðveitingarvirði

**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kampus<br>Skrásetingar í Tórshavnar býaratlassi | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 3 | | | | |
| **Mát** | 1:2000 | | | | |
| **Dagur** | 12.11.2025 | **Journal** | 25/05861 | **Teknað** | RVH |